UTTAN ÚR HEIMI

# Tann kvirra flóðaldan

**Í gjár var ein mánaði síðani flóðalduna í Suðurasia. Hendan mánaðin eru meiri enn 300.000 fólk deyð av aids, malaria og tuberklum í Afrika**

NEYÐ

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá flóðaldan skolaði inn yvir strendurnar fram við Indiska Havinum fyri einum mánað síðani, rakti hon fleiri milliónir fólk. Umleið 280.000 fólk doyðu í vanlukkuni, sum er ein tann ringasta náttúruvanlukkan nakrantíð, og sum fekk heimssamfelagið at seta tað størsta hjálpararbeiðið nakrantíð í verk.

Hendan mánaðin síðani vanlukkuna í Suðurasia eru fólk í hundraðtúsundatali deyð av sjúkum og stríði ymsastaðni kring heimin, uttan at vit hava hoyrt ella lisið nakað um tað. Okkum nýtist bert at hyggja at Afrika, tí har hava sjúkur sum malaria, aids og tuberklar kravt umleið 315.000 mannalív hendan seinasta mánaðin, skrivar Dagsavisen.

- Høvdu heimssamfelagið raðfest hesi viðurskiftini líka frammarlaga sum flóðalduna í Suðurasia, kundu vit havt bjargað hesum fólkunum, tí vit kunnu basa malaria, aids og tuberklum, bara viljin er til staðar, sigur norski læknin Atle Fretheim, sum er nevndarlimur í hjálparfelagsskapinum Læknar Uttan Landamark.

Heimsheilsustovnurin WHO metir, at 2,4 milliónir fólk í Afrika doyðu av aids í fjør, og at umleið 900.000 doyðu av malaria. Tey seinastu hagtølini viðvíkjandi tuberklum eru frá 2002, og tey vístu, at tað árið kravdi sjúkan 556.000 mannalív í Afrika.

- Ein kvirr flóðalda er á veg í Afrika, sigur ST-ráðgevin Jeffrey Sachs herfyri og vísti á, at hvønn einasta mánað doyggja túsundtals børn í Afrika av malaria.



*Síðani flóðalduna í Suðurasia hava sjúkur kravt uppaftur fleiri mannalív í Afrika, sum flóðaldan kravdi. Tað er tann kvirra flóðaldan*

*Mynd: Reuters*

# Hvussu høgt er Mount Everest?

**Kinesisk vísindafólk fara nú at kanna, hvussu høgt heimsins hægsta fjall veruliga er**

FJØLL

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í 1954 kom ein indiskur vísindamaður til ta niðurstøðu, at heimsins hægsta fjall, Mount Everest, er 8.848 metrar høgt. Hetta talið kom at standa í skúlabókunum um allan heim, men fyri fimm árum síðani kunngjørdu amerikanskir granskarar, at Mount Everest er í veruleikanum 8.850 metrar høgt. Teir amerikonsku granskararnir gjørdu sínar kanningar við GPS-skipanini.

Men nú vilja granskarar vera við, at Mount Everest er 1,3 metur lægri enn higartil hildið, tí tann veksandi hitin á Jørðini hevur fingið ísin á tindinum at bráða. Ganga vit so eftir amerikonsku kanningini í 1999, skuldi Mount Everest verið 8.848,7 metrar í dag, men so einfalt er roknistykkið ikki. Tí granskararnir vísa á, at broytingar í undirgrundini í Himmalayafjøllunum gera, at fjøllini har verða trýst umleið ein centimetur uppeftir um árið.

Við øðrum orðum hækkar Mount Everest ein centimetur um árið, samstundis sum ísurin á sjálvum tindinum lækkar....



*Tað er ikki lætt at halda skil á, hvussu høgt Mount Everest er. Undirgrundin trýstir fjallið uppeftir, men samstundis minkar ísurin á tindinum*

*Mynd: Reuters*

## Røkke fekk væl í sín part

Norsku Aker Yards-skipasmiðjurnar, sum ríkmaðurin Kjell Inge Røkke eigur meirilutan í, hava úr at gera.

Í fjør fingu norskar skipasmiðjur bíleggingar fyri tilsamans ellivu milliardir norskar krónur, og av hesum komu bíleggingar fyri seks milliardir í bíleggingarbøkurnar hjá Aker Yards-skipasmiðjunum, skrivar Aftenposten. 80 prosent av bíleggingunum eru frá norskum reiðaríum ella við norskari fígging. Sum er arbeiða umleið 1500 fólk á skipasmiðjunum hjá Aker Yards, men tá gond er komin á allar nýbygningarnar, verða umleið 3.000 fólk til arbeiðis, sigur stjórin í Aker Yards, Karl Erik Kjelstad, við Aftenposten.

Annars seldi Kjell Inge Røkke ein part av sínum partabrøvum í Aker Yards mánadagin, men hann er tó framvegis høvuðspartaeigari í felagnum.

## Enn ein avrætting

Í 1985 bleiv tann 18 ára gamli Troy Kunkle dømdur til deyða fyri at hava myrt tann 31 ára gamla Steven Horton í býnum Corpus Christi í amerikanska statinum Texas og fyri at hava stolið 13 dollarar frá honum. Gjáranáttina bleiv Troy Kunkle avrættaður í fongslinum.

Undir rættarmálinum fyri 20 árum síðani kom fram, at Troy Kunkle og tríggir vinmenn hansara høvdu boðið sær til at koyra Steven Horton til hús eitt kvøldið í august í 1984. Hann tók av, men tá teir kravdu at fáa pengarnar, sum hann hevði uppi á sær, segði hann nei, og tað endaði við, at hann fekk eina kúlu í nakkan. Undir rættarmálinum vitnaðu vinmenninir hjá Troy Kunkle, at tað var hann, sum skjeyt. Úrslitið varð, at Kunkle bleiv dømdur til deyða, meðan hinir fingu drúgva fongsulsrevsing.

Ætlanin var, at Troy Kunkle skuldi avrættast fyri ársskiftið, men av tí at hann bað hægstarætt í Texas um grið, mátti avrættingin útsetast. Rætturin vísti kortini umbønini frá sær. Trey Kunkle er annar fangin, sum er avrættaður í Texas í ár.

## Ærumeiddi pávan

Myndugleikarnir í Pólandi hava gjørt av at draga blaðstjóran Jerzy Urban í rættin, tí hann fyri trimum árum síðani skrivaði eina sera niðurlátandi grein um Jóhannes Páll páva.

Í greinini kallaði blaðstjórin pávan "ein impotentan gamlan mann" og samanbar hann við fyrrverandi sovjetska leiðaran Leonid Breshnjev. Hetta var polsku myndugleikunum ovboðið, og teir gjørdu av at ákæra blaðstjóran fyri at hava ærumeitt pávan, sum í hesum føri verður roknaður sum útlendskur leiðari. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa ímillum tríggjar mánaðar og seks ára fongsul.

Tað er ikki lukkuligt at finnast at Jóhannesi Páll páva í Pólandi. Pávin er sum kunnugt pólendingur, og hann er sera nógv avhildin í heimlandinum. 38 milliónir fólk búgva í Pólandi, og av teimum eru 35 milliónir katolikkar.

## Fuglasløg í vanda

Amerikanskir granskarar vilja vera við, at umleið 10 prosent av øllum heimsins fuglasløgum fara at doyggja út, áðrenn hendan øldin er runnin. Harafturat verða 15 prosent afturat í vanda fyri at doyggja út.

Granskararnir, sum arbeiða á lærda háskúlanum í Stanford, siga, at ímillum seks og tíggju prosent av øllum fuglasløgunum í heiminum fara at hvørva innan 2100, og at ímillum 700 og 2.500 fuglasløg verða í vanda fyri at verða útruddað tá. Granskararnir byggja metingina á veðurlagsbroytingarnar, sum sambært teimum fara at fáa sera stórar avleiðingar fyri fuglalívið á Jørðini.

Amerikonsku granskararnir gera vart við, at verða so mong fuglasløg útruddað, fer tað eisini at fáa stórar avleiðingar fyri fleiri plantusløg, og tað fer at fáa avleiðingar fyri vistfrøðina yvirhøvur, siga teir.